Eysturkommuna

# NEVNDARFUNDUR

## Býráðið

| | |
|---|---|
| **Dagfesting:** | 27.01.2022 kl. 17:00 |
| **Málnr.:** | |
| Nevndarlimir: | Hjalti Dalheim<br>Hanna Jensen<br>Per Martin Gregersen<br>Katrin Kjartansdóttir<br>Magnus Skoralíð<br>Marjun Andreasardóttir<br>Rúni Justinussen<br>Marita Klein Joensen<br>Petur Súni Jacobsen |
| Varalimir: | |
| Ikki møtt: | HjaltiDalheim<br>Katrin Kjartansdóttir<br>Magnus Skoralíð |
| Nevndarskrivari: | Ove Heinesen |


| **Málsyvirlit** | | | **Síða** |
|---|---|---|---|
| **Mál til viðgerðar** | | | |
| 1/22 | 22/00022-3 | Frágreiðing og tilmæli til mál nr. 22/00022 - Broyting av byggisamtyktini fyri neystaøkið G2 í Syðrugøtu | 3 |
| 2/22 | 21/00456-3 | Frágreiðing og tilmæli til mál nr. 21/00456 - Umsókn um at umbyggja bilhúsið á matr. nr. 48 í SG. | 4 |
| 3/22 | 21/00482-2 | Frágreiðing og tilmæli til mál nr. 21/00482 - Umsókn um langtíðarleigu av Grundini (Turkihúsið) matr. nr. 12 SG. | 6 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 4/22 | 21/00230-4 | Frágreiðing og tilmæli til mál nr. 21/00230 - Umsókn um at bygga til mark matr. nr. 35s, Geilargøta 2 SG. | 7 |
| | | | |

**Mál til viðgerðar**

## 1/22 Frágreiðing og tilmæli til mál nr. 22/00022 - Broyting av byggisamtyktini fyri neystaøkið G2 í Syðrugøtu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | | | 22/00022-3 |
| 2 Býráðið | 27.01.2022 | 1/22 | 22/00022-3 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Vísandi til mál nr. 20/00371, so samtykti býráðið tann 16.12.2021 eina serstaka byggisamtykt fyri G2: neystaøki í Syðrugøtu. Í hesum sambandi bleiv neystaøkið G2 í tí almennu byggisamtyktini víðka. Býráðið skal samtykkja broytingina áðrenn hon kann leggjast fram.<br><br>Sí Kortskjal "Neystaøki í Syðrugøtu 17012022_kortskjal 1 verandi A4.pdf" og "*Neystaøki í Syðrugøtu 17012022_kortskjal 2 broyting A4.pdf*" í málinum. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| Ongar fíggjarligar avleiðingar. |

| **Tilmæli** |
|---|
| Mælt verður til at samtykkja at broyta G2: Neystaøki í almennu byggisamtyktini samsvarandi kortskjal 2 í málinum. |

### Býráðið 27. januar 2022

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá umsitingin

## 2/22 Frágreiðing og tilmæli til mál nr. 21/00456 - Umsókn um at umbyggja bilhúsið á matr. nr. 48 í SG.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | 19.01.2022 | 3/22 | 21/00456-3 |
| 2 Býráðið | 27.01.2022 | 2/22 | 21/00456-3 |

**Málslýsing:**

Eysturkommuna hevur móttikið umsókn um loyvi at umbyggja bilhúsið á matrikkul nr. 48 í Syðrugøtu.

Tekniska umsiting hevur gjøgnumgingið umsóknina og hevur gjørt viðmerkingar, víst verður til "*NOTAT - Fyrispurningur um at broyta bilhús til íbúð.docx* " í málinum.

Um umsóknin skal gangast á møti krevst at Eysturkommunu býráð gevur frávik frá fylgjandi:

### Frávik í Byggisamtyktini:

- Á grundstykkjum minni enn 300 m² verður byggiloyvi ikki givið. Tó eru undantøk fyri grundøki, eldri enn 1. januar 2012.
- Av tí bilhúsið stendur í einum B-øki er tað ikki loyvt bert at gera íbúð, tí tað stendur í samband við bústað kann man byggja afturat tvær íbúðir. Bilhúsið stendur á egnum matrikkuli og er ikki partur av einum bústaði, men kann í prinsippinum vera/gerast bústaður.
- Hæddarviðurskifti kunnu vit ikki meta um, tí tað er ikki upplýst.
- Matrikkul 48 og 53 deila í dag parkeringsviðurskifti og er ikki pláss til bilastøðlar inni á egnari grund.
- Matrikkul 48 og 53 hava í dag ikki møguleika at hava tvey parkeringspláss pr. bústað, ið er krav samb. Byggisamtyktini.
- Verður byggiloyvi játtað, verða atkomuviðurskiftini til húsini matr.53 avmarkaði.

### Frávik í verandi standi:

- Verandi byggistig er omanfyri tí loyvda, ið er 0,4 fyri grundøki á 300 m2.
- Bilhúsið er tættari marki enn 2,5 m.
- Tað er tættari millum húsini enn 5 m.

### Frávik í nýbygging:

- Bilhúsið verður hækka nakað í mun til verandi.
- Lagt verður afturat verandi bygningslutum og minkar fráleikin til aðra grund av tí sama.
- Ætlan er at byggja svala tættari marki mótvegis matr.154, ið frammanundan er tættari marki enn 2,5 m.

**Fíggjarligar avleiðingar:**

| **Tilmæli** |
| --- |
| Talan er um fleiri frávik. Umsitingin metir ikki at tað er ráðiligt at ganga umsóknini á møti. |

**Byggi - og býarskipanarnevnd 19. januar 2022**
Byggi – og býarskipanarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá umsitingini.

**Býráðið 27. januar 2022**

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá Byggi - býarskipanarnevndini

## 3/22 Frágreiðing og tilmæli til mál nr. 21/00482 - Umsókn um langtíðarleigu av Grundini (Turkihúsið) matr. nr. 12 SG.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Vinnunevndin | 19.01.2022 | 1/22 | 21/00482-2 |
| 2 Fíggjarnevnd | 24.01.2022 | 1/22 | 21/00482-2 |
| 3 Býráðið | 27.01.2022 | 3/22 | 21/00482-2 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Eysturkommuna hevur móttikið umsókn um langtíðarleigu av Grundini í Syðrugøtu.<br><br>Ætlanin er at gera eina cafe, sí umsókn í málinum.<br><br>Um talan verður um langtíðarleigu, má Eysturkommuna fáa treytirnar í samband við ein evt. leigusáttmála uppá pláss. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| |

| **Tilmæli** |
|---|
| Ein møguleiki er, at Eysturkommuna gevur umsøkjara tilsøgn uppá Grundina í Syðrugøtu til 31. mai 2022.<br>At Eysturkommuna fær frágreiðing við tekningum um virksemi í seinasta lagi 31. mai 2022.<br>Eftir at kommunan hevur móttikið tekningar og frágreiðing, verður støða tikin til, um umsóknin um langtíðarleigu av "Grundini" verður gingin á møti.<br>Eisini skulu treytirnar í sáttmálanum neyvlýsast. |

**Vinnunevndin 19. januar 2022**
Vinnunevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá umsitingini um at geva umsøkjara tilsøgn til Grundina. Tilsøgnin verður galdandi til 31. mai 2022.

**Fíggjarnevnd 24. januar 2022**
Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá vinnunevndini.

**Býráðið 27. januar 2022**

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá Vinnunevndini og Fíggjarnevndini

## 4/22 Frágreiðing og tilmæli til mál nr. 21/00230 - Umsókn um at bygga til mark matr. nr. 35s, Geilargøta 2 SG.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | 19.01.2022 | 1/22 | 21/00230-4 |
| 2 Býráðið | 27.01.2022 | 4/22 | 21/00230-4 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Eysturkommuna hevur móttikið umsókn um loyvi at byggja ímóti mark á matrikkul nr. 35a í Syðrugøtu.<br><br>Talan er um afturatbygging til sethús á 35s, sí tekning í málinum. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| Ongar fíggjarligar avleiðingar. |

| **Tilmæli** |
|---|
| Mælt verður til at ganga umsókn um frávik á møti. |

**Byggi - og býarskipanarnevnd 19. januar 2022**
Byggi og býarskipanarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá umsitingini.

**Býráðið 27. januar 2022**

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá Byggi - býarskipanarnevndin

fundurin lokin kl. 18:00

Per Martin Gregersen

Hanna Jensen

Marjun Andreasardóttir

Rúni Justinussen

Marita Klein Joensen

Petur Súni Jacobsen